Til Fíggjarnevndina

Vísandi til fund í gjár um LM-066/2022: Uppskot til løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, verður við hesum biðið um, at mest loyvda upphæddin til byggiútreiðslurnar sambært lógaruppskotinum verður broytt til 33,3 mió. kr., ið svarar til eina hækking á 9,3 mió. kr.

Tað eru tvær orsøkir til broyttu upphæddina:

1. Landsverk hevur saman við ráðgevanum gjørt eina neyvari kostnaðarmeting av fyrsta byggistigi, høvuðsumvæling av lon 5, við støði í arbeiðstøkum, so sum niðurtøka, lendi, útveggir, tekja, máling, ventilatión o.s.fr. Kostnaðarmetingin er ein successiv kostnaðarmeting. Sambært kostnaðarmetingini kostar høvuðsumvælingin 31,3 mió. kr. íroknað útreiðslur til umsiting og ráðgeving og 15% í óvissum

2. Neyðugt verður at gera fyribils parkering á pørtum av fløtuni á Frælsinum. Hetta er ikki partur av lógaruppskotinum, og er ikki nevnt í almennu viðmerkingunum. Arbeiðið skal gerast sum skjótast, tí neyðugt verður at taka partar av verandi parkeringsøki til byggipláss, og fyri ikki at skapa óneyðugar trupulleikar av parkering úti á Frælsinum, verður mett neyðugt at gera eitt fyribils parkeringsøki á pørtum á fløtuni, inntil at bygging verður á fløtuni væntandi um fá ár. Sambært Landsverki verður arbeiðið mett at kosta 2 mió. kr.

Viðvíkjandi flytingini út úr Sjóvinnuhúsinum sigur avtalan við Tórshavnar kommunu, at Fróðskaparsetrið skal verða flutt úr 2 hæddum í 2024 og úr tí síðstu hæddini í 2025. Eins og nevnt á fundinum verður tað ein avbjóðing at klára at hýsa øllum teimum lesandi og vísindastarvsfólkunum, ið skulu flyta út úr Sjóvinnuhúsinum. Hetta fer heilt vist at krevja eyka fyribils skrivstovuhølir til vísindastarvsfólkini, eitt nú við at seta fyribils hølir upp úti á Frælsinum ella í nærumhvørvinum. Ráðið kannar eisini møguleikan fyri at fáa atgongd til hølir úti á Eirargarði. Málið verður í løtuni viðgjørt saman við Landsverki og Fróðskaparsetrinum, og vendir Barna- og útbúgvingarmálaráðið aftur, tá komið er nærri eini loysn og ein kostnaðarmeting fyriliggur.

Fíggjarmálaráðið er kunnað um málið .

Vinaliga

Djóni Nolsøe Joensen
Landsstýrismaður

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

Tinghúsvegur 5-7
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo